

19. juni – 11. juli

# SUMMARTÓNAR 2004

Faroe Islands Festival of Classical and Contemporary Music



# Vælkomin

Á hvørjum ári síðani 1992 hava konserthús og kirkjur í Havn og í øllum Føroyum verið karmur um Summartónar. Tiltakið verður samskipað av Felagnum Føroysk Tónaskøld, og hevur havt ein stóran leiklut í framburðinum hjá føroyskum tónasmiði.

Skráin fyri 2004 staðfestir leiklutin hjá Summartónum sum pall fyri nýtt tónasmið hjá føroyskum tónasmiðum og bjóðar frumframførslur hjá Tróndi Bogason, Kára Bæk, Kristiani Blak, Edvardi Nyholm Debess, Ólavi Olsen, Atla Petersen og Sunleivi Rasmussen.

Eins og undanfarin ár leggja Summartónar dent á norðurlendska andlit sítt og bjóða fram tónleik og tónleikarar úr øðrum norðurlondum, m.a. við fleiri frumframførslum. Norðurlendskt samstarv hevur verið ómissandi fyri arbeiðið hjá Summartónum at koma upp á høga tónleikaliga støðið, ið eyðkennir festivalin.

Vælkomin til Summartónar 2004.

Kristian Blak

# Welcome

Each year, since 1992, concert halls and churches in Tórshavn and all over the Faroe Islands have served as venues for the Summartónar Festival of Classical and Contemporary Music. Organized by the Association of Faroese Composers (Felagið Føroysk Tónaskøld), Summartónar has played a vital role in the development of Faroese composition.

The 2004 programme reflects the festival's role as a platform for new compositions by Faroese composers and includes first performances of works by Tróndur Bogason, Kári Bæk, Kristian Blak, Edvard Nyholm Debess, Ólavur Olsen, Atli Petersen and Sunleif Rasmussen.

As in past years, Summartónar 2004 maintains its Nordic profile with the presentation of artists and compositions, including several first performances, from other Nordic countries. Nordic collaboration has been essential to Summartónar's attaining the prominence and high musical standards that characterize the festival.

Welcome to Summartónar 2004.

Kristian Blak

# FRÍGGJADAGUR 18. JUNI

**KLÆMINTSGJÓGV NORÐLÝSIÐ KL. 18.00–23.00**

## Ólavur Olsen (trompet)

| | |
|---|---|
| **Ólavur OLSEN** (f. 1978) | KLÆMINTSSUITA ***frumframførsla*** |

# LEYGARDAGUR 19. JUNI

**TÓRSHAVN HAVNAR KIRKJA KL. 11.30**

## Muff Worden (hørpu)

| | |
|---|---|
| **Turlough O'CAROLAN** (1670–1738) | PLANXTY IRWIN |
| | SCOTTISH TRIPTYCH (trad.) |
| | *Flowers of the Forest • Nochd gun chadal • Will you marry me now?* |
| **Paul SIMON** (f. 1941) | GRACELAND |
| **Gordon BOK** (f. 1939) | THE BRANDY TREE |
| **William Butler YEATS** (1865–1939) | THE SALLEY GARDENS |
| **Jim STEWART** (f. 1948) | ANTHEM |
| **Jón ÁSGEIRSSON** (f. 1928) | MAÍSTJARNAN (Halldór Laxness) |
| | AUGUN MÍN OG AUGUN ÞÍN (Vatnsenda Rosa) |
| **Heðin Ziska DAVIDSEN** (f. 1977) | NO GOODBYES |
| **Kristian BLAK** (f. 1947) | ÁLVASTAKKUR |
| **Turlough O'CAROLAN** | MISS FANNY POWER |
| **Phil CUNNINGHAM** (f. 1960) | MISS ROWAN DAVIES |

# LEYGARDAGUR 19. JUNI

## TÓRSHAVN NORÐURLANDAHÚSIÐ KL. 19.30

### Det jyske Ensemble

*Lars Thygesen (floytu), Henrik Husum (obo), Ulla Østergaard (klarinett), Uffe Munkgaard (fagott), Palle Schou-Nielsen (horn), Øssur Bæk (violin), Mlina Fred (bratsj), Brian Friisholm (cello), Robert Sonne (bass), David Strong (klaver), Frederik Munk (gittar), Henrik Larsen (slagverk).*

**Kristian BLAK** (f. 1947) — VIENNE LA NUIT (1997)
konsert fyri horn og kamarorkestur

**Sunleif RASMUSSEN** (f. 1961) — FOUR GARDENS

*– Steðgur –*

**Kristian BLAK** — HOGBOY (1997)
konsert fyri kontrabass og kamarorkestur

**Sergei PROKOFIEV** (1891–1953) — KVINTETT Í G-MOLL OP. 39 (1924)
fyri obo, klarinett. violin, bratsj og kontrabass
*Tema – variation I – variation II – Tema · Andante energico · Allegro sostenuto ma con brio · Adagio pesante · Allegro precipitato ma non troppo presto · Andantino*

# SUNNUDAGUR 20. JUNI

## FUGLAFJØRÐUR MENTANARHÚSIÐ KL. 20.00

### Det jyske Ensemble

(Skrá sum 19. juni í Tórshavn/same programme as June 19th in Tórshavn)

# MÁNADAGUR 21. JUNI

**TÓRSHAVN — LISTASKÁLIN — KL. 19.30**

## Aladár Rácz (klaver)

| | |
|---|---|
| **Johann Sebastian BACH** (1685–1750) | 3. EINGILSKA SUITA Í G-MOLL |
| **Wolfgang Amadeus MOZART** (1756–1791) | MENUETT OG TRIO NR. 2 Í G-DUR |
| **Ludwig van BEETHOVEN** (1790–1827) | ECOSSAISE Í ES-DUR |
| **Fréderic CHOPIN** (1810–1849) | MAZURKA Í F-MOLL OP. 68 NR. 4 |
| | VALSUR Í DES-DUR OP. 64 NR. 1 |
| | POLONAISE Í AS-DUR OP. 53 |

*– Steðgur –*

| | |
|---|---|
| **Franz LISZT** (1811–1886) | 2. UNGARSK RHAPSODIE |
| **Sveinbjörn SVEINBJÖRNSSON** (1847–1926) | VIKIVAKI DANSUR |
| **Sunleif RASMUSSEN** (f. 1963) | CHAINDANCE WITH SHADOWS |
| **Igor STRAVINSKY** (1882–1971) | TANGO |
| | PIANO-RAG-MUSIC |
| **Béla BARTÓK** (1881–1945) | 1. RUMENSKUR DANSUR OP. 8A |
| **Arthur BENJAMIN** (1893–1960) | JAMAICAN RUMBA |
| **Dave BRUBECK** (f. 1920) | BOSSA NOVA U.S.A. |

# TÝSDAGUR 22. JUNI

**KLÆMINTSGJÓGV — NORÐLÝSIÐ — KL. 13.00–18.00**

## Kristian Blak (keyboard)

| | |
|---|---|
| **Kristian BLAK** (f. 1947) | FUGLAMÁL |

# MIKUDAGUR 23. JUNI

## TÓRSHAVN NORÐURLANDAHÚSIÐ KL. 19.30

### Aldubáran

*Andrea Heindriksdóttir (floytu), Anna Klett (klarinett), Christina Andersen (fagott), Jógvan Zachariassen (fagott), Páll Sólstein (horn), Ólavur Olsen (trompet), Jóhan Hentze (trompet), Andras Olsen (trombon), Dávur Juul Magnussen (trombon), Sámal Petersen (violin), Øssur Bæk (violin), Mlina Fred (bratsj), Brian Friisholm (cello), Ólavur Jakobsen (gittar), Jóhannes Andreasen (klaver). Bernharður Wilkinson stjórnar.*

| | |
|---|---|
| **Kári BÆK** (f. 1950) | PRELUDIUM & MARSJUR |
| **Atli PETERSEN** (f. 1963) | HORNTRIO ***frumframførsla*** |
| **Sunleif RASMUSSEN** (f. 1961) | DANCING RAINDROPS |

*– Steðgur –*

| | |
|---|---|
| **Igor STRAVINSKY** (1882–1971) | OKTETT |
| **Atli PETERSEN** | SKÝRÁK |

# MÁNADAGUR 28. JUNI

**TÓRSHAVN** **VESTURKIRKJAN** **KL. 19.30**

Kórkonsert „NNK: Nýggjur norðurlendskur kirkjutónleikur“. Luttakandi kór eru:

**Kór Langholtskirkju** (ÍS) Leiðari: Jón Stefánsson
**Tritonus** (DK) Leiðari: John Høybye
**Skýrák** (FO) Leiðari: Kári Bæk

Kórini syngja hvørt sína skrá.

# MIKUDAGUR 30. JUNI

**GØTA** **KIRKJAN** **KL. 19.30**

**Kór Langholtskirkju** (ÍS) Leiðari: Jón Stefánsson
**Tritonus** (DK) Leiðari: John Høybye
**Skýrák** (FO) Leiðari: Kári Bæk

| | |
|---|---|
| **Tryggvi BALDVINSSON** (f. 1965) | LOVSANGUR ZAKARIASAR |
| **Bára GRÍMSDÓTTIR** (f. 1960) | SÁLMI 47 ***frumframførsla*** |
| **Hildigunnur RÚNARSDÓTTIR** (f. 1964) | SÁLMI 150 |
| **Kári BÆK** (f. 1950) | VISITATIO (Lovsangur Elisabets) |
| | CANTATE DOMINO |
| | IN PRINCIPIO ERAT VERBUM ***frumframførsla*** |
| **John HØYBYE** (f. 1939) | MAGNIFICAT (Lovsangur Mariu) |
| | NUNC DIMITTIS (Lovsangur Símions) |
| | NÝTT VERK ***frumframførsla*** |

# MIKUDAGUR 7. JULI

## TÓRSHAVN NORÐURLANDAHÚSIÐ KL. 19.30

### Atli Ellendersen (violin) og Sune Brogård (klaver)

| | |
|---|---|
| **M. CAMARGO GUARNIERI** (1907–1993) | SONATA FYRI VIOLIN OG KLAVER NR. 4<br>*Energico ma espressivo • Intimo • Allegro appassionato* |
| **Kári BÆK** (f. 1950) | AFTURUNDIRGERÐ<br>fyri solo violin (1998) |
| **Sergei PROKOVIEV** (1981–1953) | TOCCATA, OPUS 11 fyri klaver |
| **Edvard NYHOLM DEBESS** (f. 1960) | TREES AND BIRDS<br>(2004) ***frumframførsla*** |

*– steðgur –*

| | |
|---|---|
| **Sunleif RASMUSSEN** (f. 1961) | ECHOES OF THE PAST<br>fyri solo violin (1992) |
| **Cèsar FRANCK** (1822–90) | SONATA Í A-DUR fyri violin og klaver<br>*Allegretto ben moderato • Allegro • Recitativo – Fantasia • Allegretto poco mosso* |

# HÓSDAGUR 8. JULI

**FUGLAFJØRÐUR MENTANARHÚSIÐ KL. 20.00**

## Atli Ellendersen (violin) og Sune Brogård (klaver)

(Skrá sum 7. juli í Tórshavn/same programme as July 7th in Tórshavn)

# SUNNUDAGUR 11. JULI

## GJÓGV BYGDARHÚSIÐ KL. 15.00

### Wãrme Kvartetten

*Eva Bruun Hansen (mezzosopran), Lena Bust Nielsen (floytu),*
*Marie Wãrme (accordeon), Anne Hall (cello)*

**Karólina EIRÍKSDÓTTIR** (f. 1951)
**SIX POEMS FROM THE JAPANESE** (1977)
fyri sopran, floytu og cello.
*The long, long river · This world of ours · Who is there · Imperceptible · I said in my dream · The purity of the moonlight*

**Kerstin JEPPSSON** (f. 1948)
**4 PEZZI FÖR SOLOFLÖJT** (1973)

**Kristian BLAK** (f. 1947)
**STONE FOREST** (2004)
kvartett ***frumframførsla***

**Birgitte ALSTED** (f. 1942)
**HAIKU-WÄRME** (1995) kvartett
Tekstir úr umsetingum hjá Hans-Jørgen Nielsens av japanskum haiku-yrkingum:
*Svalen i skumringen · Slettens græsser Ungt løv · Guld droslen synger · Dens liv*

# SUNNUDAGUR 11. JULI

## GJÓGV — BYGDARHÚSIÐ — KL. 17.00

### Wärme Kvartetten

*Eva Bruun Hansen (mezzosopran), Lena Bust Nielsen (floytu),*
*Marie Wärme (accordeon), Anne Hall (cello)*

| | |
|---|---|
| **Maja S.K. RATKJE** (f. 1973) **& Frode HALTLI** (f. 1975) | TRÝ TANGOLØG TIL ORÐ EFTIR GUNNAR EKELÖF (2000)<br>fyri sopran og accordeon<br>*Hemliga tecken • Fanfar • Då dagen var slut* |
| **Sven Erik WERNER** (f. 1937) | TO TANGOETYDER (1991-93)<br>accordeon solo<br>*Sneaking • Ben marcato* |
| **Lars HEGAARD** (f. 1950) | TRE BLOMSTERDIGTE (2004) (Henrik Nordbrandt) kvartett ***frumframførsla*** |
| **Øistein SOMMERFELDT** (1919–19) | OM KJÆRLIGHET (1975)<br>(Stein Mahren) sopran og cello |
| **Kerstin JEPPSSON** (f. 1948) | POLARBILDER (Lilian Goldberg)<br>kvartett |
| **Tróndur BOGASON** (f. 1976) | WER HERRSCHT? (Paul Celan)<br>kvartett ***frumframførsla*** |

*Sámal Blak og Heiðrik á Heygum sýna fram í Bygdarhúsinum.*



# Aldubáran

Aldubáran varð stovnað í 1995 av ungum føroyskum tónleikarum. Bólkurin telur nú níggju tónleikarar. Skráin hjá bólkinum er umfatandi og fevnir um tónleik frá gomlu klassisku tónasmiðunum til 20. øld. Aldubáran hevur bílagt og framført hópin av verkum hjá føroyskum og útlendskum tónasmiðum her heima og uttanlanda, og hava fingið góð skoðsmál. Bólkurin hevur eisini havt fleiri útvarps- og sjónvarpsframførslur. Á framførslum teirra verður dentur lagdur á føroyskan tónleik, men tey leggja seg eisini eftir at framføra meistaraverk úr tónleikasøguni.

www.aldubaran.fo



# Det jyske Ensemble

Det jyske Ensemble, ið varð stovnað í 1988, er eitt sonevnt basis-ensemble úr Danmark, sum miðar eftir at framføra á høgum professionellum støði, at undirvísa og økja um útboðið á klassiskum tónleiki uttan fyri miðstaðarøkið. Bólkurin hevur millum 50 og 80 framførslur um árið, bæði innan- og uttanlanda og er javnan at hoyra á Danmarks Radio. Skráin hjá Det jyske Ensemble fevnir frá barokk- til nútímans tónleik, og bólkurin bíleggur á hvørjum ári verk frá donskum tónasmiðum. Eisini hava fleiri týðandi danskir tónasmiðir ognað teimum verk. Det jyske Ensemble er mannað av níggju yrkistónleikarum.

www.detjyskeensemble.dk



# Atli Ellendersen og Sune Vejlby Brogård

Atli Ellendersen (violin) er úr Fuglafirði. Har fekk hann sínar fyrstu violintímar frá Alexi Sólstein. Hann helt fram við síni tónleikaútbúgving í Danmark hjá violinleikaranum Arne Svendsen og fór síðani á Universitetið í Keypmannahavn, har Nina Gade var lærari hansara. Hann fekk síðani undirvísing frá Max Rostal í Sveits. Atli Ellendersen hevur búð í Brasilia síðani 1989, har hann hevur spælt saman við Blumenau Kamarorkestrinum og Aurcaria Kvartettini. Hann hevur stjórnað og verið konsertmeistari og verið listarligur leiðari hjá Curitiba Kamarorkestrinum.

Sune Vejlby Brogård (klaver) er úr Birkerød í Danmark. Hann er útbúgvin á Kongaliga Danska Musikkonservatoriinum, har hann lærdi hjá Frederich Gurtler, Stanislav Knor og Amalie Maling. Hann hevur eisini gingið til master class hjá Robert Riefling, Conrad Hansen og Tatiana Nikolayeva. Sune Vejlby Brogård hevur fleiri ferðir áður framført saman við Atla Ellendersen í Føroyum.

# Nýggjur Norðurlendskur Kirkjutónleikur – NNK

Kamarkórið *Skýrák* úr Føroyum við Kára Bæk sum leiðara, *Kór Langholtskirkju* úr Reykjavík við Jón Stefansson sum leiðara og *Tritonus* úr Danmørk við John Høybye sum leiðara eru saman um tiltakið Nýggjur Norðurlendskur kirkjutónleikur. Tiltakið snýr seg um, at tónaskaldið og kórleiðarin John Høybye úr Danmark hevur skotið upp, at trý tónaskøld – eitt úr hvørjum landi – skulu skriva hvør sítt nýggja kórverk hvørt árið 2002, 2003 og 2004. Í 2002 vórðu tekstir valdir úr Lukasar evangelium (Magnificat – J. Høybye, Lovsang Zachariasar – T. Baldvinsson og Lovsongin hjá Elisabeth – ella Visitatio – Kári Bæk).

Nú endar so tiltakið her í Føroyum í 2004, og er ætlanin er at gera innspæling av teimum 9 nýskrivaðu verkunum.

Høvi verður at hoyra kórini hvørt við sínari skrá í Vesturkirkjuni mánakvøldið 28. juni kl. 19.30. Felagskonsert verður í Gøtu kirkju mikudagin 30. juni kl. 19.30.



# Aladár Rácz

Aladár Rácz er føddur í 1967 í Bucharest. Hann las á G. Enescu Conservatory í Bucharest og á Franz Liszt Academy of Music í Budapest. Frá 1999 hevur Aladár Rácz arbeitt sum klaverlærari á musikkskúlanum í Húsavík í Íslandi. Sum barn spældi hann á nógvum konsertum og var í Rumenska út- og sjónvarpinum við symfoniorkestrum. Aladár Rácz hevur eisini vunnið fleiri altjóða virðislønir í tónleikakappingum.



## Wärme Kvartetten

Wärme-Kvartetten varð stovnað í 1994 við tí fyri eyga at festa norðurlendskar núlivandi kvinnuligar tónasmiðir á fløgu. Gjøgnum árini hevur bólkurin umboðað nýggjan norðurlendskan kamartónleik á nógvum konsertum innan- og uttanlanda. Óvanliga samansetingin á bólkinum hevur givið mongum tónasmiðum íblástur til at royna nógvu møguleikarnar at bera fram tónleikin.



## Muff Worden

Muff Worden er fødd í Philadelphia í Pennsylvania í USA. Hon er universitetsútbúgvin sangari á Temple University College of Music í Philadelphia. Hon hevur framført víða um sum sangari í bólkum í USA, og hevur fyri tað mesta búð í Boston og í Camden í Maine. Í 1997 flutti Muff Worden til Íslands har hon undirvísir í sangi, klaverspæli og keltiskari hørpu á musikkskúlum á Eysturlandinum. Hon stovnaði Bláa Kirkjan Summartónleikar í 1998 í Seyðisfirði og hon undirvísir og spælir serliga skotskan fólkatónleik, haðani hon er ættað.

Summartónar 2004 hava fingið
stuðul frá hesum stovnum:

Summartónar 2004 was made
possible by grants from

Mentanargrunnur Landsins
Mentamálastýrið
Føroya Banki
Føroya Sparikassi
Dansk Komponistforening
Dronning Margrethe og Prins Henriks Fond
Beckett-Fonden
Tórshavnar kommuna
Landspeningur frá KODA.

*Summartónar is organized by Felagið Føroysk Tónaskøld (Association of Faroese Composers). Concerts in Gjógv in collaboration with Norðurlandahúsið í Føroyum (The Nordic House in Faroe Islands).*

Niels Arge Galán